# Dagstovnurin

# Alvalon



# Sørvágs Kommuna

**Vælkomin í Alvalon** ☺

Dagstovnurin Alvalon er ein kommunalur stovnur fyri børn í aldrinum 0 til 7 ár. Dagstovnurin lat upp 28. august 2006.

Á stovninum eru 6 stovur, í løtuni eru 2 vøggustovur við børnum frá ½ ár til 3 ár og hinar stovunar eru aldurs uppbýttar

Alvalon er opin í tíðarskeiðinum kl. 7.30 til 17.00. Um so er, at tit hava brúk fyri, at vit lata upp áðrenn kl. 7.30, - tó í fyrsta lagi kl. 7.00, og eftir kl. 17.00,- tó í seinasta lagi kl. 17.15, vinaliga boða stovuni frá í seinasta lagi dagin fyri áðrenn kl. 12. Vinarliga ringið á tlf. 233240 um tit ikki koma kl. 07.00

Sørvágs Kommuna hevur samtykt á bygdaráðsfundi at: Barnið kann í mesta lagi vera á stovni 9 tímar um dagin.

Um tit senda børn eftir børnum so er aldursmarkið at heinta barn 0 til 3 ár, 13 ár og 3 til 7 ár, 11 ár

<u>Frítíðarskúlin Sýslan.</u>

Frítíðarskúlin er í Sýsluni. Har eru børn úr 1. og 2. flokki.

Frítíðarskúlin er opin, tá børnini koma úr skúlanum til kl. 17.00.

Frítíðarskúlin er stongdur, tá skúlin er stongdur.

Barnagjaldið verður ásett av Sørvágs kommunu, og boðað verður foreldrunum frá, tá gjaldið verður broytt. Frá 1.august 2012 er barnagjaldið :

Børn til 0 til 3 ár gjalda kr. 2.300,- pr. mðr.
Við systk.avsl.
Kr.1725 Hálv tíð kr. 1265

Børn 3 til 7 ár gjalda: kr. 1.825,- pr. mðr.
Við systk.avsl.
Kr.1369 Hálv tíð kr. 1004

Frítíðarskúli: kr. 1100,- pr. mðr.
Hálv tíð kr.
605

<u>Gjald:</u>
Hjá frítíðarskúlanum verður goldið fyri 10 ½ mánað. juli og ½ august er einki gjald. Goldið eigur at vera fyrst í hvørjum mánaða á konto í Føroya banka nr6460 - 1739338. Viðmerkjast skal navn og nummar á barninum.
Systkinaavsláttur er fyri vøggustovu og barnagarð:
Fyri yngsta barnið er fult gjald 100%.
Eru fleiri børn gjalda tey 75% av vanliga gjaldinum.

Avsláttarskipanin er bert galdandi fyri børn, sum verða ansaði fulla tíð.
Avsláttarskipanin er ikki galdandi fyri frítíðarskúlan.

<u>Frípláss:</u>

Møguleiki er at søkja um frípláss til barnið. Frípláss verður rokna eftir inntøkugrundarlagnum árið frammanundan, ella um inntøkan broytist munandi í verandi ári. Umsóknarbløð fáast á stovninum.

<u>Uppsókn:</u>

Um tit ynskja, at barnið skal gevast á stovninum, skal sigast frá 1 mánað frammanundan til tann 1. ella ½ í mánaðinum.
Frítíðarskúlin hevur 1 mánaða uppsagnartíð til tann 1. ella ½ í mánaðinum

<u>Farloyvi:</u>

Foreldur kunnu søkja um, at barnið fær farloyvi frá ansingarplássinum við trygd fyri, at tað aftur fær pláss á stovninum, tá farloyvistíðin er úti. Søkjast má 1 mánaða undan farloyvis byrjan til ein 1. ella ½ í mánanum. Boðast skal frá í seinasta lagi

ein mánað, áðrenn barnið/børnini skulu byrja aftur.

Summarferia:
Stovnurin er stongdur í 4 vikur í summarferiuni. Vit lata altíð uppaftur 1 viku áðrenn skúlin byrjar. Feriuárið er frá 1. mai til 30. september. Um barnið heldur summarferiu 4 vikur samanhangandi, verður ein mánaður (juli) gjaldsfríður. **Um foreldur arbeiða í summarferiuvikunum**, tá vit hava stongt, er møguleiki fyri at fáa barnið ansa, hetta skal boðast skrivtliga frá hjá leiðaranum áðrenn 1. mai.
Alvalon samstarvast um summarferiuna við Sóljugarð og Miðgarð. Alvalon er opið 3. hvørt summar. Frídagar:

25. apríl: Flaggdagur
5. juni: Grundlógardagur frá kl. 12.00
28. juli: Ólavsøkuaftan frá kl. 12.00
29. juli: Ólavsøkudag
24. desember: jólaaftan
31. desember: nýggjársaftan, og annars allir halgidagar.

Stovnurin er stongdur millum jól og nýggjár.

Ráðleggingardagur:

Stovnurin hevur 2 ráðleggingardagar um árið, ein um várði og ein um heystið. Tá er stovnurin stongdur.

Tá barnið byrjar á stovninum:

Tað er umráðandi, at barnið fær eina góða byrjan á stovninum. Hetta gera foreldrini best við at vera á stovuni saman við barninum ta fyrstu tíðina. Hetta tekur vanliga 14 dagar, men er sjálvandi individuelt.

Móttøkan á stovuni um morgunin: Tað er av sera stórum týdningi fyri allar partar, og sjálvandi serliga fyri barnið, at tað fær eina góða byrjan uppá dagin. Hetta gera vit best við at samstarva, soleiðis at foreldur og starvsfólk saman finna fram til ein hátt at siga farvæl um morgunin, sum hóskar best til tykkara barn.

Tað er týdningarmikið, at barnið verður latið einum vaksnum og fær at vita, ella veit, at meðan mamma og pápi eru til arbeiðis, ansa starvsfólkini eftir mær.

Tað er gott at geva sær góða tíð, tá komið verður við barninum. At leggja matpakkan í køliskápið, siga farvæl og vinka, soleiðis, at tey síggja og kenna, at foreldrini fara avstað, og koma eftir teimum

aftur. Tað skapar tryggleika fyri barnið. Um barnið grætur, tá tað verður latið, so er best at fara avstað, tá sagt verður farvæl, og ikki venda innaftur, tí tá verður verri fyri báðar partar at skiljast.

Barnið skal fáa loyvi at gráta. Vit taka tað til okkara og troysta tað. Vit vita væl, at tað er ringt at siga farvæl undir slíkum umstøðum, og tit eru vælkomin at ringja til okkara at vita, hvussu til stendur. Okkara royndir vísa, at hetta gongur skjótt yvir, og barnið kann fara víðari í sínum spæli.

Tað er av stórum týdningi, at tit siga okkum, hvussu barnið er fyri, um tað hevur sovið, etið o.s.fr. Til tess at skilja barnið til fulnar, er tað umráðandi, at vit fáa at vita um trupulleikar ella viðurskifti heima við hús, sum kunnu hava ávirkan á gerandisdagin hjá barninum.

Umráðandi er, at tit siga frá, tá tit koma eftir barninum, so vit vita, at barnið er farið heim. Um annar persónur kemur eftir barninum, so sigið okkum frá hesum. Vit lata ikki annan persón fara við barni tykkara uttan so, at vit hava fingið boð um hetta. Um børn ynskja at fara heim við hvørjum øðrum, skal starvsfólkið kunnast um hetta frá foreldrunum.

Samstarv:

Tað er av týdningi, at allir partar leggja seg eftir at fáa í lag eitt gott samstarv. Um tit ikki trívast við stovninum, so kemur barnið heldur ikki at trívast her. Tí er umráðandi, at báðir partar tosa opið og beinleiðis við hvønn annan, um onkur ónøgd er. Tó so, vit leggja stóran dent á, at samskiftið fer fram á røttan hátt og í einrúmi. Uppbyggjandi kritikkur og góð hugskot eru altíð kærkomin

Uppmøting:

Vegna arbeiðsgongdina á stovunum skulu børnini vera á stovninum í seinasta lagi kl. 9.30, um ikki annað er avtalað

Tey børn, sum koma á stovn, skulu kunna verða við í teimum tiltøkum, sum eru innan og uttandura. Ringið til okkara, um barnið ikki kemur á stovn, hevur frí, er sjúkt ella kemur seinni (*vit taka ikki móti sms boðum).* Hetta skal gerast áðrenn kl. 9.30. Stovurnar svara telefonunum aftur kl. 10.00, tá samlingin er liðug. Seinnapartsbørn møta ímillum kl. 12. 15 og 13. 00. Børnini skulu hava etið áðrenn tey koma.

Fyrrapartsbørnini skulu verða heintaði í seinasta lagi kl. 12.30.

Sjúka:

Vit taka ikki ímóti sjúkum børnum, bæði tí tey bera smittu og tí, at sjúk børn hava brúk fyri friði og umsorgan.
Hevur barnið onkra barnasjúku, eigur starvsfólkið at fáa boð um hetta. Somuleiðis, um barnið hevur okkurt smittandi, so sum barnasár, lús, eygnabruna, munnbruna, orm ella annað. Tó kann barnið koma á stovn, tá tað er sett í viðgerð. Sí heftið um mannagongdir, sum er á hvørjari stovu.
Vit hava ikki heimild at geva børnunum heilivág. Um barnið verður sjúkt, illa fyri ella fær fepur, loyva vit okkum at ringja eftir tykkum, um vit meta, at barnið ikki er nóg væl fyri at vera á stovni.
Kemur barnið út fyri einumhvørjum á stovninum, og vit meta, at ráðiligt er at seta seg í samband við lækna, ringja vit til tykkum.

Matur:

Børnini skulu hava matpakka við. Børnini fáa frukt hvønn morgun millum kl. 8.30 og 9.00, millumála millum 14 og 15. Vit hava køkskonu, sum ger okkum heilsugóðan millummála. Vit leggja stóran dent á,

at børnini hava heilsugóðan matpakka við, so sum rugbreyð og grønmeti, eisini kunnu tey hava døgurðarestir við, sum vit kunnu heita upp til tey.

Vøggustovurnar:

Tátur, fløskur, greyt, blæur og mjólkarblanding skulu foreldur sjálvi hava við.
Øll børnini sova uttandura. Stovnurin hevur barnavognar til vøggustovubørnini.

Føðingardagar:

Tá barnið hevur føðingardag, eru tit vælkomin at hava kaku, ís, góðgæti ella annað at bjóða. Sigið frá á stovuni í góðari tíð.

Leika:

Foreldur/barn hava ábyrgd av leikum, sum barnið hevur við á stovn.

Klæðir:

Tað er av stórum týdningi, at børnini hava nokk av skiftiklæðum við, umframt regnklæðir, stivlar, vøttir, húgvu og hosur.
Foreldrini hava ábyrgd av garderobuni, og at skiftiklæðir altíð eru tøk.

Draktir, regnklæðir og gummistivlar skulu hanga úti í vátrúminum.
Av tí, at vit seta reinføri í hásæti og royna at fyribyrgja sjúku, verða til vinarliga biðjin um, at taka øll klæðini heim við fríggjadag, so vaskikonurnar fáa vaska garderoburnar.
Av trygdarávum skulu hálsturriklæðir, bond, plastikkposar og annað tílíkt ikki havast við á stovnin.
Navn skal vera á øllum klæðunum.

## Tiltøk

### Foreldrafundir:

Tveir felags foreldrafundir eru um árið, ein um várið og ein um heystið. Um heystið er val til foreldraráðið.
Á foreldrafundunum verða evnir tikin upp, sum eru viðkomandi fyri bæði foreldur og starvsfólk. Tí er tað umráðandi, at í minsta lagi eitt av foreldrunum møtir til fundirnar. Vinarliga boða frá, um tú ikki kanst møta.

### Foreldrakaffi:

Kunnið tykkum á uppslagstalvunum hjá stovunum

Garðdagur:

Stovnurin, saman við foreldraráðnum, skipar fyri einum garðdegi um árið, Sí. kunning á talvunum

Desember mánaði í Alvalon:

**Jólahald** er aðru vikuna í desember.

**Jólaløta** er fyri børnum og starvsfólk í Alvalon, har vit hava fólk uttanífrá at fortelja jólaevangeliðið. Aftaná eta vit jóladøgurða í Alvalon.

Endamálið:

Vit arbeiða samb. dagstovnalógini grein 2 og kunngerðini um virksemi o.a. á dagstovnum, frá 4. mai 2006, grein 3.

Grein 2 í dagstovnalógini:

Endamálið við námsfrøðiliga arbeiðinum á dagstovninum er:

Við umsorgan, í tryggum og barnavinarligum umhvørvi, at menna og menta børnini á fullgóðan hátt og í samvinnu við foreldrini at geva børnunum eina kristna og siðalagsliga uppaling.

At menna barnanna andsfrælsi, tollyndi, javnvirði og fólkaræði.

At búgva børnini til innlivan, samavgerð, samábyrgd, rættindi og skyldur í einum fólkaræðisligum samfelag.

At menna tey skapandi evnini hjá børnunum við atliti til at styrkja teirra samleika, sjálvsvirði, sjálvskenslu og evni til at taka sær av egnum viðurskiftum á ein friðarligan og samstarvandi hátt.
At tryggja børnunum eitt heilsugott og rørsluliga stimbrandi umhvørvi innandura og við uttanumøki, sum hóskar til barnsins aldur og førleika. Í samstarvi við heimini at styrkja um barnsins fjølbroyttu menning í tøttum samspæli við náttúruna.
Stk.2. Landsstýrismaðurin veitir kommununum ráðgeving og vegleiðing í námsfrøðiligum spurningum.

Kunngerð frá 2006, grein 3:
Stk. 1. Dagstovnurin eigur at seta orð á, hvørji námsfrøðilig mál eiga at vera nádd fyri hvønn aldursbólk av børnum, og hvussu hetta skal setast í verk.
Stk 3. Foreldur eiga at verða væl kunnað um dagliga virksemið.

Heimasíðan hjá Alvalon er: www.alvalon.fo

Leiðarin í Alvalon Gitta av Kák tlfnr. 233240 /363240

Varaleiðarin í Alvalon tlfnr: 233248

Deildarleiðarin í Frtsk. Sýsluni : tlf 233247

Stóralon: 233246
Barnalon: 233245
Barnaból: 233244
Barnabyli: 233243
Pinkuból: 233242
Lítlalon: 233241

☺




AMBULANCE

☺